

## Semja um semingsnevnd

Í Íslandi eru stjórnarflokkarnir og andstøðuflokkarnir komnir ásamt um at skipa eina nevnd, sum skal samráðast við bretar og niðurlendingar um Icesave-málið. Tað er tó treytað av, at bretar og niðurlendingar eru sinnaðir at samráðast um málið av nýggjum. Á fundinum bleiv andstøðan kunnað um, at stjórnin hevur havt samband við myndugleikarnar í Bretlandi og Niðurlondum og embætismenn á ES-høvuðsborgini um møguleikarnar fyri at samráðast av nýggjum. Tað hevur verið upp á tal at biðja fyrrverandi týska uttanríkisráðharran Joschka Fischer til semingsmann (myndin), men aftan á fundin í gjár vildi stjórnin ikki siga nakað um tað.

# Christal til Føroya at syngja

**Føroyska songkvinnan Christal stílar eftir gjøgnubroti í Danmark við nýggjari fløgu og flottum, sjónbandalagi. Leygarkvøldið hevur hon fyrstu framførsluna í Føroyum, tá ið hon vitjar Hvonn Live**

HVONN LIVE

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Julia Christa Svabo Andersen er ættað úr Miðvági, haðani mamma hennara er, men hon er uppvaksin í Danmark, og tað er eisini í Danmark, at hon nú roynir at vinna fram sum songkvinna.

Fyrsta popplagið hjá henni, Om Igen, er longu spælt nógvum í donskum útvarpi, og meira tónleikur er á veg frá Christal.

Hóast Christal er uppvaksin í Danmark, dugir hon føroyskt og er errin av sínari føroysku bakgrund.

– Eg havi sjálvt lært meg føroyskt, tí eg haldi, at tað er vigtigt at duga málið, haðani tú ert ættað, sjálvt um tú ikki býrt har. Eg eri uppvaksin í Danmark, men eg havi ferðast nógv í Føroyum, og eg havi eisini arbeitt hjá Atlantsflogi, so tað hevur hjálpt mær at læra meg føroyskt, sigur Christal

– Eg veit væl, at eg eg tosi ikki hundrað prosent korrekt føroyskt, men fólk skilja meg, so eg klári meg við tí, sum eg dugi.

### Sungið nógv

Christal hevur sungið, síðani hon var ung genta. Hon hevur sungið í kirkjukóri, hon hevur sungið gospel, hon hevur verið við í rockbólki, og hon hevur eisini gingið á musical-skúla.

– Eg havi fingst nógv við tónleik, og eg havi í nógv ár roynt at fáa givið eina fløgu út. Og tað hevur nú eydnaðist mær. Eg møtti einum framleiðara, sum eitur MDM, og vit fóru at spæla tónleik inn. Síðani fekk eg ein sáttmála við Apollon Records, sum gevur fløguna hjá mær út, sigur Christal.

### Vitjar Hvonn Live

Fyrsti sangurin hjá henni, sum kallast Om Igen, hevur verið í umfari í Danmark i eina tíð, og sangurin verður stuðlaður av einum flottum sjónbandalagi, sum kendi filmsmaðurin Lasse Spang Olsen hevur gjørt. Poppsangurin er góðar tríggjar minuttir til longdar, stílurin er nútímans urban-poppur, og tað verður hugsað um, at Christal bjóðar okkurt til bæði oyruni og eyguni.

– Myndirnar av mær skulu passa til tónleikin, sum eg syngi. Onkrar myndir eru eitt sindur frekar. Á einari mynd eri eg bara í bikini, og tað haldi mann saktans kann, uttan at tað verður ov frekt. Myndirnar skulu vera estetiskar og hava eitt úttrykk, og tað haldi eg, at mínar myndir hava, sigur Christal.

Leygarkvøldið verður Christal gestur í Hvonn Live, sum Rás2 sendir beinleiðis av Hovnn í Havn. Sendingin byrjar klokkan 20.00, og sum vant ber eisini til at koma á Hvonn og fylgja við sendingini har.



*Christal ljóðar sum ein poppstjørna, og hon líkist eisini einari við øllum tí, sum poppur eisini kann hava at bjóða*

# Sáttmálabrotini gerast fleiri

**Síðan í summar hevur Akademikarafelag Føroya upplivað eitt vaksandi tal av sáttmálabrotum hjá limum, sum arbeiða hjá kommunum og á almennum stovnum. Bygnaðarbroytingar eru mangan eitt skálkaskjól, heldur Tróndur Leivsson, formaður í felagnum**

FAKFELAGS-VIÐURSKIFTI

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Í fleiri ár, meðan væl av arbeiði hevur verið, hava fleiri av fakfeløgunum ikki hoyrt so nógv frá limum sínum. Fáir ella eingir trupulleikar hava verið við at fingið løn, og fleiri fólk hava eisini megnað sjálv at vunnið sær rættindi.

Men nú er vend við at koma í.

Tað heldur í hvussu er Tróndur Leivsson, sum er formaður í paraplyfelagnum Akademikarafelag Føroya. Hetta er meginfelagið hjá Verkfrøðingafelagnum, Magistarafelagnum, Byggifrøðingafelagnum og Arkitektafelagnum.

Tróndur Leivsson sigur, at síðan fyri summarferiuna í fjør hevur felagið fingið fleiri fráboðanir frá limum um mál, har teir halda talan vera um sáttmálabrot, og tað hevur ofta verið í sambandi við uppsagnir. Flestu limirnir arbeiða á almennum stovnum og hjá kommunum.

Fleiri av uppsagnunum eru at rokna perssónsmál, men tað eru eisini mál, sum felagið heldur ikki eru avgreidd á rættan hátt, og at mótparturin ikki hevur hildið sínar skyldur, sum ásett í sáttmálunum.

Eitt mál tapti Akademikarafelag Føroya í Fasta Gerðarrættinum, tað var fráboðanin hjá felagnum til limirnar um ikki at átaka sær eyka uppgávur á Føroya Læraraskúla. Fíggjarmálaráðið legði málið fyri Fasta Gerðarrættin og fekk viðhald.

Men í øðrum málum hevur Akademikarafelag staðið seg betur. Tað seinasta málið var um uppsagnir á Umhvørvisstovuni, sum noyddist at taka uppsagnirnar aftur.

– Vit hava lært nakað, og tað er, at vit mugu syrgja fyri at troyta allar kærumøguleikar, áðrenn málini koma so langt sum til Fasta Gerðarrættin, sigur Tróndur Leivsson.

– Fleiri mál eru kærd.

### Undanførslur fyri uppsagnum

Tróndur Leivsson hevur varhugan av, at mótparturin í summum førum roynir, hvussu langt ber til at fara.

– Eg veit væl, at bygnaðarbroytingar, umleggingar og sparingar mugu gerast summastaðni, men hetta eru mótaorð, ið ofta verða rúkt sum páskot, undanførsla, fyri uppsagnum, heldur Tróndur Leivsson.

– Samanlagda limatalið í Akademikarafelag Føroya er millum 300 og 400.

– Tróndur Leivsson kundi hugsað sær, at felagið var størri og kundi havt eina professionella umsiting til at tikið sær av tí vaksandi talinum av málum. Harvið hevði felagið verið betur ført fyri at givið eitt skikkað mótspæl.

– Nógv verður tosað um vitanarsamfelagið, sum skal útbyggjast. Tað eru komin fleiri fólk við longri útbúgvingum, og fakfelag teirra er Akademikarafelag Føroya.

– Hugsan okkara eru at fáa fleiri smærri feløg upp í okkara felag, sigur Tróndur Leivsson.

### Duga ikki at siga upp

Snorri Fjalsbak, stjóri á lønardeildini í Fíggjarmálum ásannar, at uppsagnirnar innan fyri tað almenna hava verið fleiri. Tað hendir meira enn so, at onkrir fótfeilir verða gjørdir, og so verður ósemja burtur úr tí. Ofta koma hesir feilir í av vantandi vitan, sigur hann.

Onkuntíð venda leiðarar, sum skulu til at siga fólki upp, sær til lønardeildina og biðja um ráð, áðrenn teir fara í gongd við uppsagnir.

– Tað er altíð torført at siga fólki upp, og torførari er hjá teimum, sum ikki hava roynt tað áður. Tey skulu jú bæði kenna sáttmálar, fyrisitingarlóg og duga fólkaligheit, sigur Snorri Fjalsbak.